gult20 cyan20 magenta20 svart20



# NSÍ vitjar FSV í kvøld

**Tveir av NSÍ spælarunum eru leikbannaðir, og ein kemur við aftur, eftir at hann hevur verið leikbannaður**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

6. mai skuldu FS Vágar og NSÍ havt spælt í Miðvági. Av serligum umstøðum varð dysturin útsettur. FSF gjørdi av, at hann skuldi spælast í kvøld. NSÍ hevur sambært heimasíðuni hjá felagnum gramt seg hjá Fótbóltssambandinum um, at teir eru undir órí muliga stórum trýsti. Teir spældu landskappingardyst fríggjadagin, fyrru hálvfinaluna í steypakappinginí sunnudagin, landskappingardyst í kvøld og aftur sunnudagin, seinnu hálvfinaluna í steypakappingini komandi hósdag og aftur landskappingardyst annan sunnudag. Tí høvdu teir vilja havt útsetta dystin í Miðvági spældan fyrst í juni.

Men FSF hevur staðið við sína avgerð, og NSÍ skal tískil vestur í Vágar í kvøld.

Hjá NSÍ eru Sjúrður Jacobsen og Ian Højgaard leikbannaðir. Teir fingu báðir reytt kort í Klaksvík síðsta sunnudag. Kári Hansen var leikbannaður sunnudagin, tí hann fekk reytt kort ímóti B68 dýra biðjudag. Hann verður við aftur í kvøld.

Hjá FS Vágum er hýrurin góður, eftr at teir megnaðu at koma av Sandi við øllum trimum stigunum. Allir spælararnir, sum vóru tøkir ta ferðina, eru eisini tøkir í kvøld.

Í fjør hittust FS Vágar og NSÍ í øðrum umfari í Sørvági. Ta ferðina endaði tað 3–3.

# Framvegis trongligt í toppinum

**Silkeborg vann 3–0 á AaB og kappast saman við Brøndby og FCK um DM**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

Eftir dystin í Silkeborg mánakvøldið er greitt, at tað framvegis eru trý feløg, sum eru bestu boðini upp á danska meistaraheitið í fótbólti. Brøndby er fremst, men bara eitt stig aftanfyri teir eru FCK og Silkeborg.

Hetta seinast nevnda felagið er tað einasta, sum hevur møguleikan at vinn the double. Hóskvøldið í síðstu viku vunnu teir seinnu hálvfinaluna í steypakappingini 3–0 á FCM. Í finaluni Kristi himmalferðardag skulu teir í Parkini spæla ímóti AB. Í landskappingini stríðist AB fyri at sleppa undan niðurflyting. Í steypakappingini megnaðu teir í seinnu hálvfinaluni málleysan javnleik í Viborg, og tá teir frammanundan høvdu vunnið 1–0 í Gladsakse, er greitt, at AB skal spæla ímóti Silkeborg ífinaluni.

AB hevur fleiri ferðir verið í finaluni, meðan finalan hósdagin í komandi viku verður tann fyrsta nakrantíð hjá Silkeborg.

At vinna 3–0 boðar oftast frá sannførandi avriki. Men mánakvøldið var tað ikki fyrrenn, tað restaðu átta minuttir, at tað var greitt, hvønn vegin sigurin skuldi fara.

Í 1. hálvleiki var heimaliðið komið framum við máli, sum Henrik Tømrer Petersen skoraði. Eftir steðgin royndi AaB at trýsta, við útskiftingum spentu teir álopsbogan, og teir høvdu onkrar møguleikar, sum landsliðsmálverjin, Peter Kjær, vardi væl fyri.

# Ståle hevur givið skarvin yvir

**Læknarnir hildu seg ikki kunna geva grønt ljós, og so gjørdu Ståle Solbakken og konan av, at Ståle skal gevast við fótbólti á høgsta støði**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

Mánadagin komu boðini. Á tíðindafundi í Parkini í Keypmannahavn segði FCK miðvallarin Ståle Solbakken, at hann fer ongantíð aftur at spæla fótbólt á høgum støði. Í síðstu viku ljóðaði annars, at tað vóru góðir møguleikar fyri, at norski liðfelagin hjá Toda Jónsson aftur fór at spæla.

Ståle Solbakken kunngjørdi avgerðina um at gevast við gráturødd:

– Eg kenni meg væl, men læknarnir kunnu ikki veita trygd fyri, at tað, sum var mær fyri undir venjing fyri tveimum mánaðum síðani, kann koma fyri eina ferð afturat. Konan hevur sagt mær, at so ber tað ikki til at spæla fótbólt á høgum støði, og eg eri samdur við henni.

Ståle Solbakken, sum, hóast hann bara spældi fjúrtan dystir fyri FCK, gjørdist ein hin best umtókti spælarin í felagnum nakrantíð, helt fyri, at tað var við atliti til so mong, at hann hevði tikið tungu avgerðina um at gevast:

– Tað ber ikki til, at onnur halda ondini, hvørja ferð eg liggi eftir á í fótbólti. Spurningurin hevði alla tíðina verið, um eg nú fór at koma á føtur aftur. Tað kann eg ikki bjóða fyrst og fremst konuni og børnunum, men hetta hevði heldur ikki borið til yvirfyri liðfeløgunum, mótstøðumonnunum, áskoðarunum og pressuni. Tað hevur verið tungt at tikið avgerðina, men tá eg hugsi um, hvussu væl eg eri komin meg aftur, eftir at eg lá í respiratori fyri tveimum mánaðum síðani, so eigur hetta ikki at hava so stóran týdning, staðfestir 33 ára gamli norðmaðurin, sum í 1997 kom til AaB, har hann spældi 70 dystir, áðrenn hann í fjør flutti til FCK.'

Ståle Solbakken umboðaði Noreg í 58 landsdystum.

Ítróttarstjórin hjá FCK, Niels Christian Holmstrøm, segði á tíðindafundinum, at teir fara at tosa um, hvussu tað skal verða við framtíðini hjá Ståle Solbakken og FCK.

– Men áðrenn vit fara at gera tað, skulu hann og familjan halda frí og hvíla eitt sindur. Tað hevur verið strevið hjá teimum teir seinastu tveir mánaðirnar.




*So er avgerðin um framtíðina hjá Ståle Solbakken tikin, og hendan verður ikki at finna innan yrkisfótbólt*

**Nýggjan spælara**

FCK kunngjørdi á sama tíðindafundi, at teir hava keypt ein spælara. Talan er um Carsten Fredgaard, sum felagið hevur gjørt fýra og eitt hálvt ára sáttmála við. Hann hevur áður spælt í Lyngby og tískil verið liðfelagi við fleiri av FCK spælarunum. Tey bæði seinastu árini hevur framrættaði maðurin verið í Sunderland, men har hevur hann spælt ímillum lítið og einki. Eitt skifti var hann útleigaður til Bolton.

Todi Jónsson hevur á sínari egnum heimasíðu, todi.fo, hesa viðmerkingina um nýggja liðfelagan hjá sær:

– Carsten Fredgaard kenni eg væl. Vit hava spælt saman í Lyngby. Hann er skjótur, og so hevur hann hampuliga góðan teknikk. Plássini hjá honum eru í álopinum og á miðvøllinum í vinstru síðu.

Tað vil við øðrum orðum siga, at talan er um ein kappingarneyta til plássini hjá Toda í FCK. Men í løtuni tykist ikki vera so nógv hjá Toda at óttast fyri. Vit fingu tað ikki við í blaðnum í gjár, og tí taka vit tað við nú, at sunnukvøldið metti fótbóltssendingin onside í TV3, at Todi hevði staðið seg so mikið væl ímóti Herfølge, at teir settu hann á vikuliðið.

gult21 cyan21 magenta21 svart21



Vágafólk !
Nýtt skeið
til
Buss Lastbil Trailara
í Vágum
mánakv. 21. mai
kl. 19.00
- um nóg nógv tekna seg -
nærri fæst at vita:
SP/F Koyrikortið
Tórshavnar Trafikkskúli
Stoffalág 82
Tel 318821 • 315298 • Fartel 218777

Suðuroyingar!
Nýtt skeið
Lastbil
Trailara
Buss
á Drelnesi
mánakv. 21. mai. kl. 20.00
(um nóg nógv tekna seg)
SP/F Koyrikortið
Tórshavnar Trafikkskúli
Stoffalág 82
Tel 318821 • 315298
Fartel 218777

Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

**Port State Control**

Hósdagin 17. mai 2001, millum kl. 14.30 og 18.00 verður kunnandi fundur um »Port State Control«-skipanina hildin á Føroya Sjómansskúla. PSC er ein skipan, har tey flestu evropeisku londini, saman við Kanada, hava tikið seg saman um at samskipa eftirlitið við, at útlendsk skip, sum koma í teirra havn ella sjóøki, lúka altjóða krøv frá IMO um trygd og havumhvørvisvernd á sjónum. Eftirlitið er serliga rættað móti handilsskipum í altjóða sigling.

Umboð frá Søfartsstyrelsen og Sjóvinnufyrisitingini verða við.

Frá Søfartsstyrelsen kemur Arne Ulstrup, yvirskipasýnsmaður og limur í nevndini, sum gjørdi álit um yvirtøku av skipaeftirlitinum at greiða frá hesum:

1. Stutt lýsing av altjóða sáttmálum frá IMO um trygd á sjónum
2. Samanhangur millum altjóða sáttmálar og føroyska lóggávu
3. Hvussu er eftirlitið við altjóða krøvum skipað í »Port State Control« skipanini
4. Hvussu oftani verða handilsskip kannað í útlendskari havn og hvar gongur markið fyri, nær skip verða eftirhildin
5. Hvørjar fylgjur fær tað um skip og manning ikki lúka altjóða sáttmálar

Umboð fyri Sjóvinnufyrisitingini, Eyðun Berth Jacobsen, deildarstjóri, greiðir frá teimum føroysku lógunum innan sjóvinnu, sum eru manningarlógin, mynstringarlógin og sjómanslógin. Víst verður á samanhangin millum førleikakrøv til manning og sjóvinnubrøv.

Á fundinum er lagt upp til kjak um, hvussu reiðarar og manningar kunnu vera við til at lyfta standardin á føroyskum skipum soleiðis, at Føroyar kunnu koma millum tey framkomnu londini á tí árliga PSC-listanum.

Fundurin er almennur.

*Tórshavn tann 14. mai 2001*

**Sjóvinnufyrisitingin**

***SÝNSMAÐUR*** TIL TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Søkt verður eftir sýnsmanni til skaðadeild okkara at byrja skjótast gjørligt, hetta fyri sýnsmann, sum fer í farloyvi.

Arbeiðsuppgávan hjá sýnsmanninum verður at sýna akfør og maskinur. Starvsøkið fevnir um øll sýnsøki stovnsins.

Vit vænta, at tú hevur útbúgving sum bilmekanikari, plátusmiður, ella lastbilmekanikari, og at tú hevur kunnleika til maskinamboð.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur arbeitt sum verkførari/verkstaðsleiðari. Eisini er tað ein fyrimunur, um tú hevur telduførleika á brúkarastøði.

Dentur verður lagdur á góð samstarvsevni, og at tú dugir væl at tosa við fólk.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdin og AFF.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til John Ellefsen, tel 345726.

Umsóknir skulu verða Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi 1. juni 2001.

SANSIR · TEL 355 355

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Kongabrúgvin
P.O.Box 329
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345600
Fax +298 345601
tf@trygging.fo
www.trygging.fo

**Keyp og søla av skipum**



• Skipamekling
• Skipaumboðan
• Skiparakstur

Meira fæst at vita á:
**Tlf. 318531 • Fax 319369**

TOR SHIPPING
Niels Finsensgøta 23 · Box 1252 · 110 Tórshavn
e-mail: torship@post.olivant.fo www.torship.com

**Føroyskt/Bretskt Felag**

Aðalfundurin verður mikudagin 16.5. kl. 19.30 á Miðrás 6.

Dagsskrá samb. lógini.

**Nevndin**

**Valevnislistar**
**Fuglafjarðar skúli**

Valevnislistar til skúlastýrisvalið tann 28. mai 2001 eiga at verða latnir skúlastjóranum sum skjótast og í seinasta lagi **mánadagin 21. mai.**

*Fuglafjørður, tann 15. mai 2001*
**Valnevndin f. Fuglafjarðar skúla**

**Føroyskt/Hetlendskt Vinafelag**

Aðalfundurin verður mikudagin 16.5. kl. 17.30 á Miðrás 6.

Dagsskrá samb. lógini.

**Nevndin**

**Feriuavloysari**

Søkt verður eftir feriuavloysara til ítróttarhandil okkara. Arbeiðið fevnir um alt vanligt handilsarbeiði og verður sett sum skjótast.

**P/f Thomas Dam Ítróttur**
Niels Finsensgøta 5
100 Tórshavn